## Fingu betri fiskaprís

Sunnukvøldið gjørdust fiskimenninir í Nuuk av at flyta bátarnar, sum høvdu avbyrgt havnina í býnum síðani fríggjadagin. Fiskimenninir gjørdu av at byrgja havnina av fyri at leggja áherslu á kravið um minstaprísir á fiski. Tað vildu myndugleikarnir ikki, men tá landsstýrið játtaði at samráðast við fiskimannafelagið KNAPK, valdu fiskimenninir at gevast við avbyrgingini. Samstundis boðaði Royal Greenland frá, at felagið var sinnað at rinda fiskimonnunum 75 oyru afturat tí, sum landsstýrið og KNAPK kundu semjast um. Kuupik Kleist, landsstýrisformaður, sigur við KNR, at landsstýrið hevur ikki lovað fiskimonnunum nakað, men hann ásannar, at fiskaprísurin er sera lágur.

## Laksasølan setti met

Fyrra hálvár í ár útflutti Noreg aldan laks fyri 10,7 milliardir norskar krónur. Tað var 2,4 milliardir meiri enn fyrra hálvár í fjør, og hetta er samstundis fyrstu ferð, at laksaútflutningurin hevur verið oman fyri 10 milliardir í einum hálvári, skrivar NTB. Í juni var útflutningsvirðið 2,1 milliardir krónur, sum var heili 47 prosent meiri enn í juni í fjør. Norsku alararnir útfluttu fyrra hálvár 362.000 tons av laksi í rundari vekt, harav 265.000 tons fóru til ES-marknaðin. Meðalprísurin á útflutta laksinum fyrra hálvár var 31,70 norskar krónur fyri kilo, sum var næstan hálv sætta króna oman fyri meðalprísin somu mánaðir í 2008.

# Blámusoppur í eldraíbúðunum



Fólk fegnaðust, tá ið eldraíbúðirnar undir Kráarbrekku í Klaksvík vórðu bygdar, men ikki gekk long tíð, til trupulleikarnir fóru at vísa seg. Nú er greitt, at tá ið farið verður at umvæla íbúðirnar fyri blámusopp noyðast fólkini at flyta út



**Fleiri av eldraíbúðunum undir Kráarbrekku í Klaksvík eru so fongdar við blámusoppi, at fólkini mugu flyta út, tá ið stóra umvælingararbeiðið skal gerast. Nevndin fyri sjálvognarstovnin hevur biðið sakførara kanna, hvør ábyrgdina hevur fyri at stevna**

BYGGING
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Fyrst klagaðu eini hjún í íbúðunum undir Krárbrekku í Klaksvík um fukt, men tey høvdu sítt stríð við at verða tikin í álvara.

Síðan fóru fleiri at klaga um tað sama, og tá setti nevndin fyri sjálvsognarstovnin nakrar kanningar í verk.

Og herfyri varð staðfest, at blásmusoppur er funnin í fleiri av íbúðunum.

Serliga ringt er í íbúðunum í niðaru hæddini, har blámusoppur er bæði í útveggum, skilaveggum og í gólvinum. Í íbúðunum í ovara hædd er tað gólvini, sum eru fongd vi blámusoppi. Endaíbúðirnar eru ringast.

Fólkini, sum búgva í íbúðunum, eru kunnað um skilið, bæði skrivliga og á fundi, har húsavørðurin greiddi frá støðuni.

Kanningar eru eisini gjørdar í sambýlinum undir Heygnum, og har er blámusoppur at finna í kjallaranum. Kjallarin hevur ikki verið nýttur til annað enn gioymslu.

### Mugu flyta út

Íbúgvarnir hava fingið at vita frá nevndini fyri sjálvsognarstovnin, at seinni verður gjørd ein ætlan um endurhýsing, tí tað verður so umfatandi arbeiðið at umvæla brekini, at fólkini verða noydd at flyta út, meðan arbeiðið verður gjørt. Tey í eldrasambýlunum sleppa frá at flyta, við tað at brekini avmarkað seg til kjallaran.

Nær tað verður, er ógreitt.

Formaður í nevndini fyri sjálvsognarstovnin er borgarstjórin, sum henda mánaðin er Jógvan Skorheim.

Vit eru greið yvir, at hetta er ein stórur trupulleiki, sigur Jógvan Skorheim.

Hann veit at siga, at kommunan hevur sent royndir til Danmarkar, og royndirnar vístu við vissu, at talan er um blámusopp. Heilsumyndugleikarnir hava verið uppií, og kommunan hevur havt ein danskan ráðgeva.

### Fara at stevna

Nú hevur kommunan so sent málið til sakførara, tí kommunan vil hava staðfest, hvør hevur ábyrgdina av byggifuskinum.

Tað er einki at ivast í, at málið endar í rættinum. Tá ið vit vita, hvør hevur ábyrgdina, fara vit at stevna, eisini fyri sambýlið, sigur Jógvan Skorheim.

Hann hevur onga hóming av enn, nær umvælingararbeiðið kann fara í gongd.

Tað fer at kosta nógv at umvæla íbúðirnar, men so leingi ikki er staðfest, hvør hevur ábyrgdina, og harvið hvør skal gjalda, verður einki gjørt.